


VIÐMERKINGAR

# Um álitisbrot og at gera í buksurnar

**Edvard Joensen**
*blaðmaður á Sosialinum*



Í Stoltenbergmálinum er tað bara Tórbjørn Jacobsen, sum hevur gjørt í buksurnar, og tað so dyggiliga, at skræpan spríkir úr skónum.

Hann møsnar í lesarabrævi í Dimmalætting leygardagin um dirty tricks og álitisbrot og sigur seg hava kvett alt samband við Sosialin.

Tað er tápuligt av einum politikara at gera tað. Tí eingin ivi er um, at hann fær meira brúk fyri blaðnum, enn øvugt. Tað kann hann spyrja ávísar partamenn sínar um. Slíkar uppsagnir eru fyrr komnar, men rímiliga skjótt verður ásannað, at blaðið fer at liva longri, enn teir halda politiskt.

Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, er vónsvikin av, at hann ikki fekk loyvi at gera viðmerkingar til grein í Sosialinum fríggjadagin. Tað tulkar hann sum álitisbrot, sum hann sjálvandi metir, er gjørt av undirritaða. Og hann hevur eina søgu um, hvussu samrøða okkara fór fram.

Tað er møsn, hann kemur við. Alt, sum fór fram í tí málinum, var júst sum avtalað okkara millum.

Eg ringdi til Tórbjørn mikudagin og bað hann svara uppá, hví føroyingar ikki fingu at vita, at Thorvald Stoltenberg hevði tikið seg aftur úr teirri nevnd, sum Norðuratlandsbólkurin á Fólkatingi annars hevði boðað frá, at hann skuldi sita í.

Tað er rætt, at tosað varð um alt millum himmal og jørð, uttan kanska livandi grind.

Grundin er einføld til, at so var. Tórbjørn Jacobsen veik hvørja ferð, hann fekk tann konkreta spurningin, frá evninum og fór at tosa um annað fyri á tann hátt at royna at leiða samrøðuna burtur frá tí, hann ikki vildi svarað uppá.

Hetta er ikki óvanligt fyribrigdi í hasum selskapinum, og verður hetta vanliga kallað uttanumtos.

Tórbjørn Jacobsen letst misnøgdur við tað, sum refererað er frá teirri samtaluni. Tað, sum skrivað er, er tað, sum hevði týdning fyri málið, og man Tórbjørn Jacobsen vera tann av okkum báðum, sum eigur at vera best nøgdur við, at ikki øll samrøðan verður endurgivin.

Fleiri feðrir undir samrøðuni royndi eg at koma inn aftur á sjálvan spurningin, sum var, um tað var tí, at tað nærkaðist vali í Føroyum, at Norðuratlansbólkurin gloymdi at siga føroyingum frá, at Stoltenberg hevði tikið játtan sína aftur.

Tá einki annað gjørdist hjá manninum, fór hann at møsna um, at danska stjórnin hevði lagt trýst á Stoltenberg og hevði brúkt sendistovuna í Oslo til hjálpar. Kanska eisini føroyska Javnaðarflokkin, legði hann afturat.

Ásannandi, at har kom ikki greiðari svar uttan tað, at alt var eitt mistak, segði eg honum frá, at eg fór at kanna hjá donsku sendistovuni í Oslo og hjá Thorvaldi Stoltenberg, um hetta var so.

Løtu seinni ringdi maðurin aftur og vildi síggja greinina, sum skrivað varð.

Eg segði honum, at tað varð eingin grein skrivað tann dagin – mikudagin – tí eg væntaði ikki, at fáa svar úr Danmark og Noreg til deadline, sum er á middegi.

Tað gekk so umleið eitt samdøgur – út á fyrrapartin hósdagin – til svar kom. Síðan varð greinin skrivað og send til e-mail adressuni hjá Tórbirni, sum hann sjálvur hevði sagt mær.

Sagt varð samstundis frá, at hann fekk høvi at gera viðmerkingar til faktuellar feilir, t.v.s. skeiv sitat, men ikki loyvi at rætta í orðingum í greinini. Hetta tí at bæði eg og starvsfelagar á blaðnum hava upplivað, at ávísir politikarar hava viljað broytt tekstir og enntá viljað steðgað greinum, áðrenn tær eru komnar í blaðið.

Greinskrivarin var heilt vísur í, at einki skeivt sitat var í greinini, og tí eri eg framvegis vísur í.

Tá einki var frætt aftur, tá deadline var, varð roknað við, at eingin viðmerking kom, og greinin fór til umbróting.

Seinni ringdi so føroyski skrivarin hjá Norðuratlantsbólkinum og segði, at Torbjørn sat í einum taxabili á veg til flogfarið til Føroya, haðani hann lat siga, at hann ikki kundi góðtaka sumt, sum í greinini stóð.

Eg royndi at ringja til hansara beinanveg, men fekk ikki samband við hann, fyrr enn hann var lendur í Vágum seinnapartin. Tá var hann longu fornermaður.

Hevur Tórbjørn Jacobsen hug at vera fornermaður við meg og blaðið, eg arbeiði fyri, so hann um tað. Eg ætli mær framvegis at heilsa upp á Tórbjørn, tá eg møti honum, og er tað relevant fyri tíðindaflutningin, fari eg eisini at tosa við hann í blaðhøpi.

Men framvegis verður bíðað eftir tí einfalda svarinum til tann einfalda spurningin um, hví Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi ikki boðaði føroysku fjølmiðlunum frá, at Thorvald Stoltenberg hevði tikið játtan sína aftur.






# Brek í spæli møguliga orsøkin

**Fríggjakvøldið hendi ein syndarlig vanlukka umborð á ísfiskatrolaranum Jaspis, sum tá lá við bryggju í Runavík. 53 ára gamli Jógvan Sonni Drangberg úr Skopun lat lív, tá hann fekk ein veir í høvdið. Brek í einum spæli er møguliga orsøkin**

VANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Manningin var júst í ferð við at loysa frá bryggju, tá vanlukkan hendi. Maðurin stóð har aftur á hekkuni, og hann skuldi saman við tveimum ørðum loysa ein nylon-veir, sum hekk av skipinum og niður á bryggjuna.

Ein maður á bryggjuni skal loysa henda endan, sum er tengdur at einum spæli á dekkinum. Maðurin, sum stendur við spælið, skal slaka, so maðurin á bryggjuni fær loyst endan. Men ístaðin fyri at slaka, strammar spælið í. Veirurin ger ein brest, og maðurin, sum stendur á dekkinum fær hann í høvdið.

Lækni kom á staðið beinanvegin, og hann staðfesti, at maðurin doyði á staðnum. Løgreglan fekk fráboðanina klokkan 22.20 fríggjakvøldið.

Løgreglan kannar í løtuni spælið, sum veirurin var tengdur at. Orsøkin er, at hóast maðurin við spælinum slakaði, sum teir vanliga gera, so gjørdi spælið tað mótsetta. Spælið hevði júst verið til umvælingar, og illgruni er um, at okkurt brek hevur verið í spælinum, sum gjørdi, at tað strammaði ístaðinfyri at slaka.

# Eldur í timburverkstaði

**Leygarkvøldið var eldur í timburverkstaðnum hjá byggivirkinum Suðuroyrarhús í Froðba. Verkstaðurin fekk nakað av roykskaða**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*

Leygarkvøldið klokkan hálvgum níggju varnaðust grannarnir, at tað loðaði úr verkstaðnum hjá Tormann Vang, sum liggur í Støklunum í Froðba.

Sløkkiðliðið á Tvøroyri kom á staðið beinanvegin og basti eldinum, so hann ikki breiddi seg til restina av virkinum.

Illgruni er um, at eldurin stavar frá eini oljufýring, tí tað er í eystara endanum av virkinum, at eldurin er byrjaður. Bygningurin hevur mest fingið roykskaða, men eisini nakað av vatnskaða.

Tormann Vang eigur byggivirkið, og hann sigur, at virkið fer at liggja lamið í nakrar dagar. Tað letur ikki uppaftur í hesi vikuni, men um tað gongur væl, verður latið uppaftur í næstu viku.

Virkið er 200 fermetrar, og virksemið fevnir um hús og vanligt snikkaraarbeiði.

# Kunoyarnes er stongt

**Í sambandi við at ILA er staðfest í alibrúkinum á Kunoyarnesi, er økið nú stongt fyri allari óviðkomandi ferðslu**

ILA
*Stefan í Skorini*

Vinnumálastýrið kunngjørdi hósdagin 11. apríl, at økið kring Kunoyarnes er stongt vegna ILA í alibrúkinum, sum Faroe Salmon í Klaksvík eigur.

Forboð er sett ímóti fiskiskapi og allari óviðkomandi sigling nærhendis alibrúkinum í sambandi við, at ILA er staðfest á staðnum.

Vinnumálastýrið hevur tí sett hesi tiltøk í verk. Í fyrsta lagi er forboð sett ímóti fiskiskapi nærri enn 500 metrar frá alibrúkinum, og í øðrum lagi er forboð at sigla nærri enn 500 metrar við alibrúkið um siglt verður um Kalsoyarfjørð. Um siglt verður um Haraldssund, skulu bátar halda seg so tætt Borðoyarlandinum sum gjørligt.

Forboðið er sett við heimild í lógini um djórasjúkur viðvíkjandi fyribyrging og niðurberjing av sjúkum.

# Umfatandi herverk í summarhúsum

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Løgreglan varnaðist um vikuskiftið, at umfatandi herverk er framt í einum summarhúsum í Skopun.

Húsini liggja soleiðis fyri, at tey ikki síggjast væl frá alfaravegi, og tí hevur

Løgreglan dugir ikki at siga, nær tað er framt, tí eingin hevur verið í húsunum allan vetur. Sýslumaðurin kann ikki siga meira, enn at herverkið er framt einaferð í vetur.

Húsini er sera illa farin. Nógvir lutir í húsinum eru oyðilagdir, og ótangarnir

annað fyri at oyðileggja. Herverkið varð fráboðað løgregluni leygardagin.

# Føroyingur farin fyri borð í Grønlandi

**Føroyingur farin fyri borð í Grønlandi**

VANLUKKA
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin um middagsleitið føroyska tíð fór ein føroyingur, sum var við einum lítlum grønlendskum rækjubáti, fyri borð. Maðurin er 56 ára gamal og býr í Miðvági. Hann var skipari á Gaia 3.

Báturin var staddur langt úr landi í Vesturgrønlandi, tá óhappið hendi. Fýra bátar, sum vóru á leiðini, leitaðu eftir manninum allan sunnudagin, og sjóverjan hevur eisini verið við í leitingini, upplýsir politimeistarin í Nuuk.

Gaia 3 kemur væntandi til Sisimiut í morgin, og tá verður sjóforhoyr um vanlukkuna.

Politimeistarin upplýsir annars, at veðrið var gott um hesa leiðina, tá óhappið hendi. Eingin vindur og gott sýni. Enn er eingin orsøk til vanlukkuna staðfest.

Fleiri kvinnur á Ting

www.javnratt.fo

Lesið hvat

Helena D. á Neystabø
Heri Kragesten
Jógvan Mørkøre

halda